

*Bert 15 dagar eru til forsetavalið í USA*

**Um greinskrivaran:**
Janus á Ryggi lesur í løtuni stjórnmálafrøði á San Diego State University í Kalifornia.

**Um myndakvinnuna:**
Gunnhild Dahl Niclasen. Lesur í løtuni stjórnmálafrøði á California State University í San Diego.

# Amerikanska forsetavalstríðið á einum vegamóti

FORSETAVAL
*Janus á Ryggi*

Seinastu tíðina hava fleiri meiningakanningar víst, at demokratiska forsetavalevnið Barack Obama hevur væl størri undirtøku millum veljarar republikanska valevnið John McCain. Mett verður, at búskaparliga støðan er ein stór orsøk til rákið. Nú seinasta stóra kjakið millum mótstøðumenninar báðar nærkast, verður neyðugt hjá John McCain at koma við einum greiðum boðskapi um búskaparstøðuna skal hann gera sær vónir um at taka Barack Obama aftur, meta fleiri eygleiðarar.

Fyrr í mánaðinum vísti ein landsumfatandi veljarakanning hjá CNN, at Barack Obama hevði 8 prosent størri undirtøku millum veljarar. Í gjár vísti ein onnur stór kanning frá fýra ymsum lyklastatum sama mynstur. Mett verður, at búskaparliga støðan er ein stór orsøk til gongdina. Í lyklastatinum Wisconsin svaraðu 53 prosent, at Barack Obama skilir búskapin betri enn John McCain, ímeðan bert 32 prosent søgdu, at John McCain skilir búskapin betri enn mótstøðumaðurin. Røddir eru tó frammi og ávara um at taka tølini í ov stóran álvara, tí at tað framvegis er tíð til at venda gongdini.

## John McCain:

Fleiri orsøkir kunnu vera til munin teirra millum. Ein stórur vansi fyri John McCain er, at hann hoyrir til sama flokk, sum sitandi forseti George W. Bush, ið sambært fleiri meiningakanningum telist millum ringast umtóktu forsetar í amerikanskari søgu. Barack Obama hevur brúkt nógva orku upp á at seta John McCain í samband við førda politikkin hjá Bush stjórnini. Serstakliga hava fólkini hjá Barack Obama givið førda politikkinum skuldina fyri búskaparstøðuna, ið rakar meint hjá mongum vanligum amerikanarum.

Tølini tykjast seta valevnini í hvør sína støðu í valstríðnum. Fleiri hava róð frammundir, at skal Barack Obama vinna, skal hann bert halda fram á sama hátt sum higartil, ímeðan John McCain noyðist at ganga nýggjar leiðir. John McCain og hansara fólk hava í eina tíð gjørt nýggjar royndir at seta Barack Obama í ringt ljós við at umrøða ymiskt í fortíðini hjá Barack Obama, eitt nú tilknýti til persónar við serliga víðgongdum hugsjónum. Eftir øllum at døma hevur tað tó ikki eydnast at venda rákinum. John McCain tykist nú ikki at brúka nógva orku upp á hetta og hevur í seinastuni roynt at givið fleiri boð upp á, hvussu búskapurin skal skipast.

*Hagtøl: CNN og Washington Post*

tað almenna at koma alt ov langt inn í persónliga lívið hjá fólki, sigur republikanski aktivisturin og viðhaldsmaðurin hjá John McCain, Ray Rudolph.

## Kalifornia

Á valinum 4. november skulu fólk í Kalifornia ikki bert taka støðu til forsetavalevnini bæði. Eisini skulu tey velja umboð í umboðsmannatingið og til síni egnu tingkømur, har demokratarnir í løtuni hava meirilutan. Harumframt skulu tey taka støðu til 12 uppskot um ymsar lógarbroytingar. Av hesum hevur eitt uppskot um, at broyta lógina soleiðis, at tvey av sama kyni ikki kunnu giftast, fingið serliga stóra umrøðu. Møguleikin hjá tveimum av sama kyni at giftast, hevur bert verið í stutta tíð og politiskt konservativir bólkar royna nú av øllum alvi at broyta lógina aftur. Enn er ikki greitt hvussu úrslitið verður.